# út at koyra



## Punto góðan karakter fyri trygd

Fiat Punto, sum nú eisini fæst við dieselmotori, fekk fýra stjørnur á seinastu chrash-testini hjá Euro NCAP. Kanningin vísti at Fiat fult út megnar at gera bilar sum liva upp til tað sum kundarnir vænta av trygd í einum nútímans bili.

**Kelda: Fiat Automobiler Danmark A/S**

## Samstarva um dieselmotor

Síðan september 1998 hava 120 verkfrøðingar hjá Peugeot og Ford samstarva um eina nýggja røð av orkusparandi dieselmotorum. Hesir motorar verða ein kollvelting innan smærri dieselmotorar tá teir koma á marknaðin í 2001.

**Kelda: Peugeot i dag**




## Infiniti, luksusbilur hjá Nissan

Infiniti er eitt bilmerki hjá Nissan, ein luksusbilur, serliga til amerikanska marknaðin. Annars eigur Renault 36.8% av partapeninginum í Nissan bilverksmiðjuni, sum keypur dieselmotorar frá Peugeot, og selur motorar til VW.

**Kelda: Bilen Motor & Sport**

# Super Dekk við nýggjastu sporiútgerð




*Nú hevur Super Dekk fingið sær eitt av nýggjastu og mest framkomnu sporitólum. Hetta er eitt teldustýrt Hunter 411 sporitól, við eini skipan, har Microsoft Windows TM verður nýtt til undirvognin, og ger tað skjótt og lætt at arbeiða*

Magnus Gunnarsson

Fyrr vóru eingi krøv sett til sporing og avbalansering av bilum. Um bilurin sleit dekkini skeivt, bleiv hann stillaður við at máta við tummastokki millum forhjólini. Balansering av hjólunum varð ikki til, bilarnir brúktu diogonaldekk, vegirnir vóru vánaligir, og ferðin var ikki so nógv, at tað var brúk fyri balansering.

### Heilt onnur krøv

Tá so asfaltið kom á vegirnar, og bilarnir kundu koyra við meira ferð, komu heilt onnur krøv til bilarnar. Diogonal dekkini vóru ónýtilig til koyring á asfalti, og nú merktist, at bilurin risti, tá hann kom upp í ferð. Einastu ráðini vóru at skifta dekkini út til radialdekk og fáa hjólini balanserað. Super Dekk Service var fyrst við teimum digitalu balansamaskinunum, sum komu fyrst í sjeytiárunum.

### Bakhjólini stýra bilinum

Tá bleiv eisini neyðugt at hava góð tól at spora bilin við. Í 1976 fekk Super Dekk Service, ið tá helt til í Jekaragøtu, har sum Form & Figur er nú, sítt fyrsta amerikanska Hunter sporitól við framkomnari 4 hjólsútmáting. Hetta var nakað heilt nýtt, og starvsfólk vórðu send til Danmarkar á skeið fyri at læra, hvussu undirvognurin á einum bili er uppbygdur, t.d. at tað eru bakhjólini, sum stýra bilinum, og forhjólini verða stillað eftir teimum. Um bakhjólini standa skeivt, koyrur allur bilurin skeivt, sjálvt um tann sum koyrur bilin ikki leggur merki til tað, síggja tey, sum koyra aftanfyri, at bilurin fer eftir liðini.

### Teldan hevur yvir 1600 digitalar myndir

So hvørt sum vegirnir verða betri, bilarnir betri og meira viðkvæmir, verða krøvini til verkstøðini, sum gera arbeiðið, alsamt størri. Bilar, sum vóru afturgjørdir eftir ein stóran skaða, skuldu hava váttan frá bilverkstøðunum uppá, at teir høvdu verið í upprættarabonki og útskrift av eini 4 hjóls útmáting, fyri at blíva góðkendur av bileftirlitinum og fáa nummarpláturnar aftur. Hetta førdi við sær, at bilar komu úr øllum landinum til útmátingar.

Nú hevur Super Dekk fingið sær eitt av nýggjastu og mest framkomnu sporitólum. Hetta er eitt teldustýrt Hunter 411 sporitól, við eini skipan, har Microsoft Windows TM verður nýtt til undirvognin, og ger tað skjótt og lætt at arbeiða. Skermurin hevur tilsamans yvir 1600 digitalar myndir, sum vísa upphang, róðurgreiðir, og hvar stillingarnar eru til teir ymsu vinklarnar. Eisini er serlig útgerð til teir nýggjastu Audi og VW bilunum, sum skulu lyftast uppfrá meðan teir verða stillaðir. Í Danmark brúka t. d. FDM og Teknologisk Institut hesa sporiútgerð.






# út at koyra




*DKW Auto Union 1000 Universal Combi er langa navnið á hesum bilinum hjá Thorbjørn Djurhuus, timburmeistara á Tvøroyri. Hann keypti bilin frá Gunnar Hansen í oktober 1962 fyri 15.585 kr við eykasetrum aftast, áðrenn tað hevði Thorbjørn havt eina DKW Condor RT-200 motorsúkklu. Á myndin er Gunhild Djurhuus og dótturin Irdi.*

# Søgan um DKW, Auto Union og NSU

Magnus Gunnarsson

Stovnarin av DKW og Auto Union, Jørgen Skafte Rasmussen, flutti sum ungur úr Danmark til Týsklands, har hann bygdi upp eitt ídnaðarveldi. Hann mátti gjalda høgan prís, tá nazistarnir róku hann frá egnu fyritøkuni í 1934, einans tí at hann var útlendingur.

### DKW er ein stytting av Damp Kraft Wagen

Jørgen Skafte Rasmussen var føddur í Nakskov í 1878. Sum útlærdur smiður flutti hann til Týsklands, har hann lærdi til verkfrøðing og fekk sær týska konu. Sum 25 ára gamal stovnaði hann sína egnu verksmiðju, sum framleiddi útbúnaða til dampketlar.

Í 1912 ger J. Skafte Rasmussen royndir við dampdrivnum bilum, og kallar hesa ætlan Damp Kraft Wagen, ið varð stytt til DKW.

Eftir fyrra heimsbardaga fær hann kunnleika til 2-taktmotorin, motorslagið sum bleiv drívmegin í øllum DKW bilum og motorsúkklum. Eftir fyrra heimsbardaga fer hann undir framleiðslu av knallertum og motorsúkklum, og DKW bleiv ein av heimsins stórstu motorsúkkluframleiðarum.

J. Skafte Rasmussen hevði stóran áhuga í bilaframleiðslu, og ásannaði, at tíðin var farin frá dampbilunum og einum el-bili, hann hevði arbeitt við. Í 1928 kom fyrsti DKW bilurin, P15 við 2-takt bensinmotori, og á bilaframsýningini í Berlin í 1931 kom DKW F1, ið fekk sera góða móttøku.

### Auto Union

Statsbankin í landslutinum Sachsen hevði so stórt álit á J. Skafte Rasmussen, at teir í 1932 eggjaðu honum til at yvirtaka fleiri verksmiðjur, sum vóru í fíggjarligarligum trupulleikum. Úrslitið bleiv ein samanlegging av bilverksmiðjunum DKW, Audi, Wanderer og Horch undir navninum Auto Union. Búmerkið var fýra samanflættaðir ringar, sum umboðaðu hesi fýra bilmerkini.

J. Skafte Rasmussen bleiv offur fyri nazismuni. Orsøkin var, at hansara umfatandi ídnaðarveldi hevði stóran týdning fyri landslutin Sachsen, og sum møguligur framleiðari av hernaðarútgerð, dámdu nazistunum ikki, at ein útlendingur átti og stýrdi hesum fyritøkum. Uttan ávaring ella endurgjald varð hann koyrdur frá í 1934.

Tá seinni heimsbardagi var av, lógu allar verksmiðjurnar hjá Auto Union í tí økinum, sum var hersett av Sovjet, tað sum seinni bleiv til Eysturtýskland. Har hildu russarnir áfram við at framleiða DKW bilarnar, undir navninum IFA. Eisini komu Trabant, Wartburg og MZ motorsúkklurnar, sum eru eftirkomarar hjá DKW.



*Her DKW bilurin hjá Niels L. Arge, ursmiði, uttan fyri bilverkstaðin hjá Hans J. Clementsen í Lucas Debesargøtu. Maðurin við bilin er Hjalmar Reynstind*

**Mynd: Thorbjørn Djurhuus**

### Seinasti DKW í 1965

Auto Union bleiv endurstovnað í Ingolstadt, bert við tekningunum av DKW bilum og motorsúkklum. Tað var sum at byrja av nýggjum.

Teir fyrstu bilarnir vóru ein blandingur av nýggjum og gomlum, men fleiri nýggj snið komu í 50 og 60 árunum, sum DKW 3=6, F-11 og F-12.

Mercedes bilverksmiðjan Daimler-Benz var eigari av Auto Union frá 1958 til 1964.

Í 1964 kom tann seinasti ektaði DKW bilurin, F-102 við 3 cyl. 2-taktmotori. Hetta árið yvirtekur Wolksvagen fyritøkuna Auto Union, og hesin DKW F102 bleiv í 1965 broyttur nakað og fekk 4 cyl. 4-taktmotor, og koyrdi víðari sum Audi 60, og varð fyrsti Audi eftir kríggið.

Eftir at J. Skafte Rasmussen bleiv koyrdur frá síni egnu fyritøku, arbeiddi hann við ymiskum øðrum ídnaðarvirksemi. Hann fekk tó nakað av endurgjaldi fyri alt, hann hevði mist.

Í 1938 bleiv hann heiðraður sum heiðursdoktari við tekniska skúlan í Dresden, og fekk eisini heiðurin at verða kosin riddari av Dannebrog. Í 1948 flytur hann heim aftur til Danmarkar við familjuni, og búði í Keypmannahavn til hann andaðist í 1964.

### NSU var prinsurin innan luftkøldar bilar

Í 1969 verður fyritøkan VW/Auto Union, sum hon nevndist tá , løgd saman við NSU verksmiðjuni, sum hevði verið ein stór motorsúkkluverksmiðja, men síðst í 50-árunum góvust teir við motorsúkkluframleiðslu, og fóru at gera bilar.



*Seinast skrivaðu vit um Gunnar Hansen (1914-1968), sum umframt at vera heilsølumaður, eisini seldi knallertir, motorsúkklur og bilmerkini DKW, NSU og Mercedes-Benz*

Teir fyrstu bilarnir fingu navnið NSU Prinz. Navnið Prinz kom av, at VW bleiv roknaður sum kongurin innan luftkøldar bilar, so kundi NSU í minsta lagið vera prinsurin.

Týski maskinkonstruktørurin, Felix Wankel, menti Wankel-motorin saman við NSU-verksmiðjuni. Motorurin var liðugur í 1957, og fyrsti NSU bilurin við Wankel-motori kom á marknaðin í 1963.

Mazda bilverksmiðjan í Japan framleiddi allar sínar RX bilar við Wankelmotori við loyvi frá NSU.

Í 1985 vóru nøvnini Auto Union og NSU strikað, men teir fýra samanflættaðu ringarnir eru framvegis búmerki hjá Audi bilverksmiðjuni.

*Lýsing frá 1961 um „Eventyr Prinz´en i Deres bildrømme“.*

**DKW lýsing frá 1961**

